# Rógvi Johansen heldur flagg-dagsrøðuna í Árhus

Mánakvøldið 25. apríl kl. 19.00 skipar Føroyingafelagið í Árhus fyri flaggdagshaldi í hølum felagsins á Vestergade 48 D.

Á skránni verður felagssangur og røða. Í ár verður tað vágbingurin Rógvi Johansen, sum heldur flaggdagsrøðuna.

Tey flestu kenna nokk Rógva frá súkkling. Bæði í heimligu og donsku kappingini hevur hann gjørt seg galdandi. Hann hevur vunnið føroyska meistaraheitið í súkkling á 30 km einkulstart sjey ferðir á rað og hevur m.a. enn metið á tí teiginum.

Rógvi býr í Hasselager og til dagliga starvast hann sum leiðari á Moesgaard Foto/Medielab Aarhus Universitet.

Aftaná felagssangin og røðuna er kaffi og heimabakaðar køkur á skránni. Meira fæst at vita um Føroyingafelagið í Árhus á: www.aarstova.dk.

# Ellisakfør í SMS

Føroya Ellisakfør hevur hesa vikuna framsýning á Torginum í SMS. Framsýningin byrjaði mánadagin 18. apríl og verður til og við leygardagin 23. apríl. Á framsýningini eru snotulig ellisakfør, bæði bilar og motorsúkklur. Eisini er ein myndaframsýning.

Komandi mánadag 25. apríl verður árliga flaggdagskoyringin, har ellisakførini verða sýnd fram undir flaggdagshaldinum.



# Einki at frætta um ránið

**Kriminaldeildin í Havn hevur framvegis ikki fingið nøkur ítøkilig spor at ganga eftir í málinum um danan, sum fíggjanáttina varð útsettur fyri ráni mitt á Havnargøtum**

RÁN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, sigur, at onkur hevur vent sær til kriminaldeildina við upplýsingum, men at teir tó ikki hava fingið nakað ítøkiligt at ganga eftir enn.

– Tað er enn ov tíðliga at siga nakað. Tað kann væl vera, at okkurt kemur nú komandi dagarnar, tí tað er ikki altíð at fólk hoyra tíðindini um vikuskiftið. Vit vita av royndum, at tá vit sóknast eftir upplýsingum frá fólki, so nýtast teir ikki koma beinanvegin, slær Bergleif Brimvik fast.

Hann sigur, at løgreglan framvegis fegin vil hoyra frá fólki, ið veit okkurt um málið ella sum halda seg hava varnast eitthvørt um miðnáttarleitið hóskvøldið, tá ein dani, sum bert var í Føroyum í nakrar dagar, varð útsettur fyri rán.

Hann sat hóskvøldið á café natúr, inntil tað stongdi. Síðani fór hann til gongu niðan eftir Bringsnargøtu. Har varð hann sligin ella sparkaåur niður aftanífrá, og bæði fartelda og pengapungur vórðu stolin frá honum. Maðurin sá ikki um tað bert var ein ella um tað vóru fleiri ránsmenn, men hann hoyrdi í øllum førum, at tað bleiv tosað føroyskt.

Danin gav eina lýsing av einum manni, sum var ljóshærdur og kanska fyrst í 30'unum. Hann var í ljósabrúnari bundnari troyggju og bláum cowboybuksum.

Sum sagt, so vil kriminaldeildin ógvuliga fegin frætta frá fólki, ið halda seg vita eitthvørt um málið.




Vika 16, 2005
www.kaupthing.fo

# Metstórt handilsjavnahall

MARKNAÐARRÁK

Tøl fyri handilsjavnan í USA í februar vístu metstórt hall á 61 mia. dollarar. Seinasta mánaðin er hallið økt 2,5 mia. dollarar. Vanliga hevði hetta fingið dollaran av vikna, men dollarin er hinvegin styrknaður útvið 1,5% síðan kunngerðina. Høgi oljuprísurin økir handilsjavnahallið. Eisini øktur innflutingur úr Kina, orsakað av at Kina hevur slept einari útflutningskvotu, ávirkar. Oljuprísurin og broyttu viðurskiftini í Kina kunnu tó økja handilsjavnahallið enn meira. Hetta kann ávirka bæði gjaldoyru og rentur í næstum.

**Lánsbrævarenturnar lækkaðar enn meira**

Lánsbrævarenturnar ávirkaðust ikki av handilsjavnatølunum í farnu viku. Hinvegin fingu sera vánalig tøl fyri smásøluna í USA í mars størri ávirkan. Millum annað hetta hevur viðført, at rentan á danska 10-ára lánsbrævinum nú er á sama metlága stigi, sum hon var tann 10. februar. Onnur orsøk til rentulækkingina er, at amerikonsk partabrøv hava staðið seg illa seinastu dagarnar, og liggja nú á ársins lægsta stigi.

**Oljan ikki stimbrað partabrøv enn**

Í apríl er oljuprísurin lækkaður góðum 10% frá methøgum stigi. Hetta hevur tó ikki stimbrað parabrøv. Ein orsøk er, at oljuprísurin kortini er sera høgur enn. Onnur orsøk er, at hóast einans 10% av størstu virkjunum í USA enn hava kunngjørt roknskap fyri 1. ársfjórðing, hava hesir verið heldur lakari enn seinasta ársfjórðing. Millum feløgini, ið hava staðið seg illa er IBM. Av tí at lítið er fráliðið við roknskaparkunngerðunum, kann hendan myndin broytast.

**Hesa vikuna**

Prísvøkstur, serliga í USA, er í andglettinum í løtuni. Tí verða høvuðshendingarnar týsdagin og mikudagin, tá ávíkavist framleiðslu- og brúkaraprísir úr USA verða kunngjørdir. Ein orsøk til lækkandi lánsbrævarenturnar er, at amerikanski tjóðbankin neyvan fer at seta dik á rentuhækkingarnar. Gerast prísvakstrartølini hægri enn væntað, kann marknaðurin broyta hugsan hesum viðvíkjandi, soleiðis at renturnar hækka aftur. Hetta kann leggja trýst á partabrøvini. Spennandi vika er fyri framman.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,77 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 5,35 | 0,5% | ↑ |
| GBP | 10,92 | 0,5% | ↑ |
| NOK | 0,91 | -0,4% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,77 | 0,0% | → |
| Evru Lánsbrøv | 172,59 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 88,24 | -1,9% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 60,95 | -0,8% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*